gult20 cyan20 magenta20 svart20



# Framtaksgrunnurin setir 4,5 milliónir í partapeningi í Formula.fo

**Framtaksgrunnurin heldur forritið hjá Formula.fo, Patsec, sum serliga er ætlað medico-deildum á sjúkrahúsum, vera so áhugavert, at grunnurin setir 4,5 milliónir krónur í fyritøkuna**

VINNULÍV
*Framtaksgrunnurin*

Framtaksgrunnurin hevur nú gjørt av at seta hálvafimtu milliónir krónur í KT-fyritøkuna Formula.fo í Havn. Tá nýggja nevndin í Framtaksgrunninum tók við 1. januar 1999 gjørdi hon av, at grunnurin framyvir átti at hava ein virknari leiklut í fjøltáttanini av føroyskari vinnu. Hetta skuldi m. a. gerast við at seta pening í vinnur, ið grundað á sítt virksemi á vitan sum framleiðslutilfeingi, eitt nú kunningatøkni.

– Vitan er tann avgerandi vinnuligi førleikin í nútíðarsamfelagnum, og Formula.fo er ein áhugaverd fyritøka fyri okkum, tí hon longu hevur víst í verki, at hon hevur førleikagrundarlagi fyri at kunna gera seg galdandi á altjóða marknaðinum, um fortreytirnar annars eru í lagi, sigur Wilhelm Petersen, nevndarformaður í Framtaksgrunninum.

Formula.fo hevur í umleið hálvtannað ár verið á altjóða marknaðinum við forritinum PATSEC.

PATSEC – Patient Security System – er serliga ætlað medicodeildunum á sjúkrahúsum. Øll tól og líknandi verða skrásett í forritinum, so gjørligt er at hava fullfíggjað yvirlit yvir, hvørjum standi tólini eru í, nær tey skulu eftirkannast, og hvør hevur ábyrgdina av hesum.

Tað hevur gingið rættiliga væl hjá Formula.fo at selt PATSEC-forritið. Eitt nú hava átta sjúkrahús í Danmark valt skipanina frá Formula.fo, fram um aðrar líknandi skipanir. Harumframt eru útlitini á týska, hollendska og enska marknaðinum góð.

– Tað er sera kapitalkrevjandi at menna EDV-forrit til útflutnings, tí hevur leiðslan í Formula.fo tikið stið til at fáa nýggjar íleggjarar til felagið, soleiðis at verkætlanin kann sjósetast við fullari kraft frá fyrsta degi, sigur Óli Hansen, stjóri í Formula.fo.

Tað at Framtaksgrunnurin nú setur pening í útflutningsætlanina hjá Formula.fo fer at framskunda marknaðarføringina av PATSEC. Eisini førir hetta við sær, at eitt annað forrit, TRM – Time Resource Management – verður víst fram á TorNuuRek 2001 í Reykjavík fyrst í juni mánað, og at sama forrit verður sett á europamarknaðin í heyst.

TRM er eitt forrit til skráseting av tíðarnýtslu av øllum tilfeinginum hjá eini fyritøku, tað veri seg starvsfólk, hølir, amboð o.s.frv. TRM er samskipað við Microsoft Outlook og kann t.d. samskipast við sakskipanina og/ella lønarskipanina hjá kundanum.

Wilhelm Petersen, nevndarformaður í Framtaksgrunninum, sigur, at bæði PATSEC og TRM eru sera áhugaverd, og nevndin í Framtaksgrunninum hevur mett, at ein íløga í forritini til útflutnings er í tráð við ætlanina hjá Framtaksgrunninum um at fjøltátta føroyskt vinnulív og luttaka í tí vakstrarpotentiali, sum er í teim vinnugreinum, har vitan er høvuðsfyritreytin og rávøran.

Torkil Holm Petersen, nevndarformaður í Formula.fo og Óli Hansen, stjóri á Formula.fo, fegnast báðir um, at Framtaksgrunnurin heldur útflutningsætlanina hjá Formula.fo vera so áhugaverda, at grunnurin hevur gjørt av at seta eina milliónaupphædd í fyritøkuna.

*– Hettar er ein viðurkenning og álitisváttan til okkara, og vit fara at gera okkara ítarsta fyri at liva upp til álitið frá Framtaksgrunninum, siga teir báðir.*

# Kongurin vitjar

**Fremsti telvari í heiminum seinastu fimtan árini, Garri Kasparov, verður í Føroyum í døgunum 8.-12. juni í ár. Talvsamband Føroya hevur boðið tí russisku talvbjørnini heim á klettarnar í summar. Ovast á breddanum er ein dystur millum Kasparov og føroyska olympiska talvlandsliðið.**

TALV
*Talvsamband Føroya*


*Garri Kasparov verður gestur hjá Talvsambandi Føroya í døgunum 8.-12.juni.*

Grundað á eina nýggja, framkomna telduskipan fóru teldufrøðingar í 1988 at rokna og leggja saman tøl og úrslit úr talvkappingum á hægsta stigi seinastu sløku hundrað árini. Endamálið var at fáa til vega eitt so beint, eftirfarandi og fullfíggjað yvirlit sum til bar yvir bestu telvarar í heiminum nakrantíð. Á odda á hesum yvirliti, undan øllum hinum, bæði livandi og deyðum – Lasker, Capablanca, Aljechin, Botvinnik, Fischer og Karpov – var tann tann 25 ára gamli Garry Kasparov. Í dag er hann 38 ára gamal, men framvegis – á sekstanda ári – ovastur á tindinum.

22 ára gamal í 1985 ritaði hann navn sítt upp í talvsøguna sum yngsti heimsmeistari nakrantíð. Í einum titaniskum víggi í Moskva feldi hann heimsmeistaran síðani 1974, Anatolij Karpov. Kappingin um krúnuna var í nógv ár eitt eirindaleyst stríð millum hesar báðar sovjetisku stórmeistarnar. Hetta var bergtakandi telving millum tveir í stíli rættiliga ymiskar úrmælingar.

Tann flokstrúgvi og í Kreml avhildni Karpov var tann framúrskarandi posisjónstelvarin og makaleysi strategurin. Tann braneggjaði antikommunistiski aserbadjanski blandhundurin Kasparov skakaði øll við óvanliga ágangandi og framfýsnari telving. Hann søkti at við hugflogi, kraft og víðskygni. So sterkt var løtt, at alt brast sum eitt vakurt fýrverk, tá hann læt skotini ganga av. Hetta var álopstelving av aðrari gongustjørnu og aðrari tíð.

Garry Kasparov var við yvirlutan í øllum HM-dystunum móti Karpov, hóast tað stóð á gomlum naglum hvørja ferð. Hann hevur vart HM-heitið í fleiri dystum enn nakar annar heimsmeistari í nýggjari tíð. Í 1989 tók hann seg sum fyrsti og einasti telvari nakrantíð uppum tað gandaða 2800-talið í ratingskipanini, sum er barometur og yvirlit yvir dagsstyrkina hjá telvarum.

## Stríðsmaður í andgletti

Garry Kasparov var føddur 13.apríl 1963 í Baku í Aserbadsjan í Sovjetsamveldinum. Pápin var jødi og mamman úr Armenia. Seks ára gamal lærdi hann mannagongdina, og longu sum trettan ára gamal gjørdist hann sovjetiskur ungdómsmeistari. Fyrstu altjóða kappingina vann hann í 1979, og árið eftir – sum 17 ára gamal – gjørdist hann stórmeistari. Í 1980 var hann millum teir seks, sum umboðaðu Sovjetsamveldið á talvolympiaduni á Malta.

Árini frá 1973 til 1978 nam hann sær regluliga frálæru frá fyrrverandi heimsmeistaranum Mikhail Botvinnik. Eftir tað var Aleksander Nikitin knýttur at honum sum serstakur venjari.

Framfýsna og ósmædna telvingarlagið endurspeglar eisini lyndið í honum. Kasparov hevur longu frá ungum árum havt greiða støðu í spurningum um ymisk viðurskifti. Avgjørdar og tretaleysar støðutakanir og sannføringar hava mangan borið hann í hvassan andglett. Hann kom til ilnar við sovjetiska ítróttarmálaráðið, kommunistaflokkin og KGB. Hann stóð frammarlaga í antikommunistisku rørsluni, sum tók seg upp seinnapartin í áttatiárunum, og hann var uppi í orðaskiftinum um stríðið um landslutin Nagorno-Karabakh, sum Aserbadsjan og Armenia bæði kannaðu sær.

Viðuskiftini millum hann og forsetan í altjóða heimstalvfelagsskapinum FIDE, Campomanes, vóru so spent, at hann tók seg úr FIDE og stovnaði í 1993 saman við bretska HM-avbjóðaranum Nigel Short nýggjan felagsskap, Professional Chess Association (PCA). FIDE-felagsskapurin ógildaði samstundis HM-heitið hansara. Kasparov hevur ikki telvað við í FIDE-fyriskipaðu HM-kappingunum aftur.

Í fjør var hann fyri fyrstu ferð við undirlutan í dysti móti øðrum stórmeistara. Brain Games-felagsskapurin skipaði fyri serstøkum HM-dysti millum Kasparov og krúnprins hansara, russaran Vladimir Kramnik, sum mong hava spátt sum eftirmaður hansara. Men Kasparov svaraði alt fyri eitt aftur, og sigraði í øllum teimum størstu kappingunum, sum allir av heimsins fremstu telvarum mannaðu.

Hóast Viswanathan Anand úr India er heimsmeistari hjá FIDE-felagsskapinum og Vladimir Kramnik er meistari hjá Brain Games-felagsskapinum mugu teir kortini takkast við at standa eitt trin lægri undir lið meistarans, tí á altjóða styrkilistanum er støðan í oddanum framvegis óbroytt – nummar eitt er enn sum áður Garry Kasparov.

## Simultandystur móti landsliðnum

Mest forvitnisliga tiltakið á Føroyavitjanini verður helst dysturin millum føroyska landsliðið og Kasparov. Tað verður skipað so, at heimsins besti telvari skal kappast móti seks teimum sterkastu føroysku telvarunum í senn. Hetta verður simultantelving, teir rópa; Kasparov fer at ganga ímillum tey seks borðini og hevur tí einstakar dystir móti hvørjum av teimum seks føroysku landsliðstelvarunum. Ímóti munandi sterkari telvarum enn teimum føroysku hevur Kasparov verið ruddiliga við yvirlutan, tá hann hevur havt seks telvarar ímóti sær í senn, og tí er ikki væntandi, at føroysku telvarnir fara at standa honum kurl. Livst so spyrst!

Føroysku telvarnir vera John Arni Nilssen, John Rødgård, Heini Olsen, Eyðun Nolsøe, Torbjørn Thomsen og Ólavur Simonsen. Við undantaki av Flóvin Tór Næs eru hesir seks teir fremstu á føroyska styrkilistanum. Henda kappingin verður í Norðurlandahúsinum sunnudagin 10. juni. Møguleiki verður hjá áskoðarum at fylgja við gongdini í hvørjum talvi á serstøkum borðum, sum víst verða á stórskíggja í salinum. Dysturin verður eisini varpaður beinleiðis á Internetinum.

Dagin fyri, leygardagin 9. juni, telvar Kasparov móti 25 telvarum í øðrum simultandysti í Klaksvík. Føroysku telvararnir í Norðoyastevnudystinum verða ikki teir sterkastu í landinum. Kasparov setur sum treyt fyri slíkum dystum, at ongin av mótstøðumonnunum hevur hægri styrkital enn 2000. Við í hesum dysti verða millum annað allir núlivandi fyrrverandi føroyameistarar í einstaklingstelving, sum hava lægri styrkital enn 2000. Hesir eru Hans Petersen, Súni Ziska, Luitjen Apol, Hanus Joensen, John Jacobsen og Andrias Ziska. Eisini eru allir fyrrverandi formenn í Talvsambandi Føroya, sum ganga undir krøv Kasparovs um avmarkað styrkital, bodnir við í henda dyst.

Ymiskt annað er eisini á skránni hesar dagarnar, sum heimsins besti telvari fer at vitja í Føroyum.


*Tann braneggjaði antikommunistiski aserbadjanski blandhundurin Kasparov skakaði øll við óvanliga ágangandi og framfýsnari telving*

gult21 cyan21 magenta21 svart21

ítróttur

Nr. 102 • hósdagur • 31. mai 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Næstbestu vágbingarnir eru á odda

**Og hvalbingar tykjast hava hug at snodda til møguleikan fyri uppflyting, meðan tað er merkisvert, hvussu illa tað hevur skorist hjá toftamonnum**

Tað hevur gingið eitt sindur stiltið at fáa úrslitini frá 4. og 5. umfarinum. Tey seinastu árini hevur tað verið ein týðulig framgongd soleiðis at skilja, at dómaraseðlarnir rættuliga skjótt eru komnir FSF í hendi, men soleiðis hevur tað ikki verið í ár, og tað er spell. Um teir, sum døma í 3. deild, halda, at hetta er ein áminning til teirra um at gera skjótari av og beinanvegin at senda seðlarnar til FSF í staðin fyri at lata teir liggja í buksulummum og taskum, so hava teir skilt boðskapin rætt!

Vit gera skjótt av hesa ferð. Vónandi vera tað betri umstøður í seinni umførum at gera meiri burturúr, enn tað hevur verið hesa ferð. Vert er í hesum sambandinum at leggja til merkis, at sætta umfarið í 3. deild er á skránni komandi mánadag, 2. hvítusunnudag. Tá verður eisini spælt í 2. deild, meðan 1. deild heldur frí. Tað verður ikki spælt í bestu deildini, tí landsdystir eru á skránni bæði leygardagin og mikudagin.



## Toppur og botnur

Meðan tað hevur gingið sera striltið í bestu deildini hjá VB, so hevur tað gingið sum eftir ánni hjá næstbesta liðnum. Hetta er merkisvert, tí tá fleiri av lyklaspælarunum í 1. deild hava verið skaddir, kundi tað kugsast, at tað gekk út yvir næstbesta liðið. Men tað hevur tað ikki gjørt soleiðis, at tað hevur sást aftur í úrslitunum í 3. deild. VB er á odda í 3. deild.

At Royn er næstfremst var kanska meiri at rokna við. Hvalbingar hava ferðast fleiri ferðir ímillum deildirnar. Í fjør fluttu teir niður, og hóast teir hava skifti nógv fólk, so verða teir ivaleyst ímillum tey bestu.

B68 hevur ferðast fleiri ferðir ímillum 2. og 3. deild. Tann tíðin tykist vera farin. Nú tykjast toftamenn skula stríðast fyri plássinum í 3. deild. Í fimta umfarinum eydnaðist tað B68 at fáa fyrstu stigini. TB javnaði til 3–3, tá tað restaðu tríggir minuttir, men í síðsta minuttinum skoraði Bogi Petersen sigursmálið hjá B68.

## 3. deild

3. umfar

**B71–ÍF 9–0 (5–0)**
(málskjúttarnir restaðu seinast)
1–0: Høgni Hansen 7
2–0: Hans Meinard Midjord 11
3–0: Símun Hansen 16
4–0: Høgni Hansen 29
5–0: Høgni Hansen 36
6–0: Hans Meinard Midjord 52
7–0: Høgni Hansen 72
8–0: Jónsvein Thomsen 75
9–0: Ib Mohr Olsen 84

4. umfar

**GÍ–B36 2–2 (0–2)**
0–1: Tummas Eli Hansen 5
0–2: Ragnar Poulsen 39
1–2: Jóan Petur Olsen 67
2–2: Jóan Petur Olsen 79

**KÍ–Royn 1–1 (1–0)**
1–0: Bogi Isaksen 5
1–1: Rúni Thomsen 70

**AB–VB 3–1 (1–1)**
1–0: Fróði Stenberg 6
1–1: Hans Allan Niclasen 14
2–1: sjálvmál 69
3–1: Niels E á Krákusteini 85

**B68–B71 0–1 (0–0)**
0–1: Eirikur Poulsen 19

**ÍF–TB 3–2 (1–1)**
1–0: Henry Petersen 15
1–1: Kim Roest 42
2–1: Høgni Zachariasen 70
3–1: Jákup Dahl 74
3–2: Andrass Nolsøe 85

5. umfar

**VB–GÍ 5–0 (1–0)**
1–0: Dan Djurhuus
2–0: Bergur Winther
3–0: Bergur Winther
4–0: Hans Allan Niclasen
5–0: Dan Djurhuus

**B71–KÍ 3–0 (1–0)**
1–0: Kári Sørensen 17
2–0: Kári Sørensen 80
3–0: Niels Petersen 86

**Royn–AB 2–0 (0–0)**
1–0: Njálur Niclasen 69
2–0: Regin Thomsen 90

**TB–B68 3–4 (1–2)**
1–0: Jesper Bøgehave 29
1–1: Janus Thomsen 38
1–2: Olaf Højgaard 45
2–2: Bogi Johannesen 50
2–3: sjálvmál 82
3–3: Bogi Johannesen 87
3–4: Bogi Petersen 90

**B36–ÍF 3–5 (1–3)**
0–1: Njál R. Petersen 1
0–2: Tomek Trzybylski 6
1–2: Tummas Eli Hansen 7
1–3: Mortan Thomsen 44
2–3: Ingi Olsen 59
2–4: Henry Petersen 74
3–4: Tummas Eli Hansen 75
3–5: Henry Petersen 78

# Í dag verður farið undir niðurteljingina

**Allan Simonsen og hansara menn fara fyrrapartin í dag undir fyrireikingarnar til teir báðar HM undankappingardystirnar, sum eru á skránni leygardagin og mikudagin**

Fyrrapartin í dag verður av álvara farið undir fyrireikingarnar til HM undankappingardystirnar. Hin fyrri verður á Svangaskarði leygarkvøldið klokkan 19.15, og hin seinni verður á Tórsvølli mikudagin klokkan 18.

Landsliðsspælararnir skulu møta á Svangaskarði klokkan 10.30, og fyrsta venjingin verður klokkan 11. Landsliðið fer at halda til í hølunum hjá Tryggingarfelagnum Føroyar í Runavík, og seinna venjingin í dag verður sambært løgdu skránni klokkan 17.30.

Sambært skránni er ætlanin at venja tvær ferðir í morgin og eina ferð leygarmorgunin, men tað kann vera, at hetta verður broytt. Tað plagar at koma ann upp á, hvussu veðurlíkindini eru, og hvussu væl spælararnir eru fyri.

Tað hava verið ivamál um onkrar av spælarunum, men tá vit frættu seinast, vóru allir spælararnir tøkir. Tað vil siga, at Christian Høgni Jacobsen, sum orsakað av skaða hevur spælt heilt lítið við NSÍ síðstu vikurnar, er í landsliðshópinum.

Umframt teir átjan spælararnar, venjaran og hjálparvenjaran, so erufýra fólk knýtt at landsliðnum: Heðin Askham er liðleiðari, Álvur Hansen og John–Reid Skoralíð eru fysioterapeutar, og Torbjørn Viderø er lækni.

# Skarpskjúttin er ikki við

**Og best kendi sveisiski spælarin er so mikið skaddur, at hann hevur givið avboð til dystin ímóti Føroyum**

Tá føroyingar í oktober vóru í Sveis fingu teir ein orduligan lúsing. Sveis vann 5–1, og frá tí dystinum er tað ivaleyst serliga eitt navn, sum rennur fram fyri føroyingar. Tað er Kubilay Türkiylmaz. Hann umsetti tey trý brotsspørkini, sum Sveis fekk, til mál.

Men hesin Türkiylmaz er ikki við í sveisiska ferðalagnum, sum í dag kemur til Føroya. Hann hevur givið avboð til landsliðsfótbólt, tí hann heldur, at sveisisku áskoðararnir hava niðurgjørt hann og turkisku rótina, sum hann er runnin av.

Stéphane Chapuisat man vera kendasti sveisiski spælarin. Hann hevur áður spælt við Borrusia Dortmund, sum hann í 1997 var við til at vinna europeisku meistarakappingina fyri. Chapuisat, sum nú umboðar Grasshopper, er so mikið skaddur, at hann hevur givið avboð til Føroya ferðina.

Men hóast hesir báðir ikki eru við, so eru nøvnini á sveisisku spælarunum ivaleysa kend til, at tað kann roknast við einum torførum dysti hjá føroyingum.

Í løtuni man Liverpool vernjuspælarin, Stéphane Henchoz ivaleyst vera kendasta navnið. Hann var ímillum teir fyrstu ellivu, tá Liverpool fyri stuttum vann UEFA cup finaluna.

## Stórur áhugi

Skulu vit meta eftir halanum, sum fylgir við sveisiska landsliðnum, so er áhugin stórur fyri dystinum leygarkvøldið.

Fótbóltssambandið hevur hoyrt um 44 tíðindafólk, sum koma úr Sveis og til dystin. Talan er um blaðfólk, útvarpsfólk og sjónvarpsfólk.

Umframt sveisisku tíðindafólkini koma eisini tíðindafólk aðra staðni frá úr heiminum á Svangaskarð. Roknað verður við, at útlendski fjølmiðlaskarin í alt fer at telja omanfyri hálvt hundrað fólk. Pressuumboðanin úr Føroyum verður omanfyri tjúgu.